# MASKINMEISTARIN

Nr. 2 / September 2017



Oljugoymsla:

## EIN LITUR SKAL VERA EIN LITUR



Trygdin í norsku oljuvinnuni



Sjóvinna 2017



Ein túrur í Barentshavinum

**Útgevari**
Maskinmeistarafelagið.
Blaðið verður sent limunum.
4 útgávur eru um árið.

**Blaðnevnd**
Páll Hansen, ábyrgd
Jóan Petur Patursson

**Maskinmeistarafelagið**
Grønlandsvegur 58
Postboks 3238
110 Tórshavn
Tel 31 47 18
Teldupostur: mf@mf.fo

**Blaðhald**
Tey, sum ynskja at halda MASKIN-MEISTARAN, kunnu boða frá hesum í teldupost til: press@press.fo
Haldaragjaldið er 200,- kr. um árið; t.e fyri 4 bløð

**Endurgeving**
Tað er loyvt at endurgeva tekst úr MASKINMEISTARANUM, tá keldan verður upplýst. MASKINMEISTARIN kann heintast í PDF á heimasíðuni hjá felagnum: www.mf.fo

**Forsíðumyndir**
*Tummas Pauli Juul:*
Øssur Winthereig
*Oljupallur:*
Ólavur Frederiksen
*Sjóvinna:*
Grækaris D. Magnussen
*Sjúrðarberg mynd:*
Torkil Højsted

**Umsiting og redaksjón**
Press: press@press.fo
Øssur Winthereig
ossur@press.fo
Tel 21 84 86
Ingolf S. Olsen
ingolf@press.fo
Tel 22 50 77
Grækaris Djurhuus Magnussen
grakaris@press.fo
Tel 51 44 44

**Umbróting, prent og liðugtgerð**
Estra 478500

Upplag: 800

# INNIHALD

Ein litur skal vera ein litur ..... 5
Trygdin í norsku oljuvinnuni versnað ..... 9
Fegnast um orðaðan sjóvinnupolitikk ..... 14
Formansfrágreiðingin:
Sjóvinnustýrið/FAS fyri atfinningum ..... 18
Skatta-FAS fer í søguna ..... 20
19 maskinmeistarar fingu prógv ..... 21
Ein túrur í Barentshavinum
– sæddur úr kjølinum ..... 23
Føðingardagar ..... 26
Maskinmeistarafelagið:
Tíðindi ..... 27










## Heldur lægri enn hægri aldursmark

Sjóvinnustýrið/FAS vil sleppa at loyva skipum eldri enn 20 ár at skráseta seg í FAS, helst við tí eina endamáli at seta ferð á skrásetingarnar. Talið av FAS-skrásettum skipum liggur jú rættiliga langt frá málinum, sum stjórin í Sjóvinnustýrinum og FAS setti sær, tá hann tók við – nevniliga 150-200 skip áðrenn 2018.

Men Maskinmeistarafelagið mælir staðiliga frá at lækka aldursmarkið fyri, nær skip kunnu skrásetast í FAS, og hetta sjónarmið hevur FMU eisini vart í arbeiðnum at orða ein nýggjan sjóvinnupolitikk. Undirritaði hevur umboðað FMU – Faroe Maritime Union, sum er samstarvsfelagsskapurin hjá teimum føroysku manningarfeløgunum – í arbeiðsbólkinum, sum hevur gjørt tilmæli til nýggja sjóvinnupolitikkin.

Tað ljóðar kanska so lýtaleyst, at FAS heldur vil meta skip út frá søguni hjá tí einstaka skipinum heldur enn ítøkiliga aldrinum, men í Maskinmeistarafelagnum eru vit ikki í iva um, at eitt hægri aldursmark verður ein innbjóðing til dangur í ivasomum standi.

Politiska skipanin hevur endiliga tikið seg saman at lata eina hurð aftur við at steðga høpisleysu skipanini við sonevnda skatta-FAS, har tað ber til at bareboat leiga skip, ið ikki lúka treytirnar fyri at sleppa upp í FAS, men sum fáa somu skattligu fyrimunir sum FAS-skipini.

Um nú ein onnur hurð í staðin skal latast upp at slúsa skip í ivasomum standi inn í FAS, so er onki vunnið.

Maskinmeistarafelagið mælir staðiliga frá hesum, og heldur, at um pilkast skal við aldursmarkið, so var meira skil í at lækka tað heldur enn at hækka tað.

*Páll Hansen*

**Páll Hansen**
*– formaður í Maskinmeistarafelagnum*




# SKEIÐ Á VINNUHÁSKÚLANUM

## VINNUHÁSKÚLIN

- BRM-skeið
- ERM-skeið
- Ship Handling
- Skeið í heilsulæru og endurnýggjan
- ARPA-skeið
- ECDIS-skeið
- Tecdis-skeið
- SSO-skeið
- § 16-skeið
- ISPS-skeið
- Endurnýggjan av vinnubrøvum
- Tankers Safety-skeið
- Flutningur av vandamiklum farmi
- Ketilpassaraskeið
- GMDSS-skeið
- LRC-skeið
- GOC-skeið og endurnýggjan
- DP Basic/induction
- DP Advanced/Simulator
- DP endurnýggjan
- AIS
- Tankers familiarisation
- Háspenningsskeið maskinmeistarar
- Háspenningsskeið maskinistar

## TRYGDARDEPILIN VIÐ ÁIR

- Eldsløkking umborð á skipi
- Endurtøkuskeið eldsløkking u.s.
- Sløkkileiðsla umborð á skipi
- Eldsløkking fyri skipsyvirmenn
- Endurtøka IMO 80
- Trygdarskeið grundleggjandi
- Trygdarskeið fult
- FRC-grundskeið
- Bátaføraraskeið
- Medisinsk fyrstahjálp
- Stroppaskeið

Skeiðini eru sambært STCW-sáttmálanum við broytingum frá 2010.
Koturnar til skeiðini finnast á heimasíðu skúlans.

Vinnuháskúlin · Boks 104 · 110 Tórshavn
Tel 350 250 · info@vh.fo · www.vh.fo

VINNUHÁSKÚLIN
CENTRE OF MARITIME STUDIES & ENGINEERING




*Tummas Pauli Juul (vm) og Jaspur Neshamar frá Arbeiðseftirlitinum kalibrera teljiverkið á oljugoymsluni í Søldarfirði*

# Ein litur skal vera ein litur

**Jaspur Neshamar, maskinmeistari og efitrlitsmaður á Arbeiðseftirlitinum hevur um hendi at góðkenna vekt og mát hjá fyritøkum, virkjum og stovnum í Føroyum. Kundar og viðskiftafólk skulu hava álit á, at um tey keypa vørur í vekt ella øðrum máti, at tað veruliga er samsvar millum vektina og veruleikan. Veruleikin hjá vektini er eitt eittkilo-lodd, sum stendur í Paris. Allar vektir eiga at kunna sporførast aftur til meiri enn 200 ára gamla loddið í Paris.**

**TEKSTUR OG MYNDIR:** ØSSUR WINTHEREIG, PRESS

Tá oljutangin til húsini er fyltur leggur bilførarin á tangabilinum ein seðil í postkassan við einum tali á, hvussu nógvir litrar eru fyltir á hesaferð.

Men ber til at hava álit á, at litratalið er rætt?

Eru 1150 litrar nú eisini 1150 litrar?

Í morgun eru Jaspur Neshamar og Tummas Pauli Juul frá Arbeiðseftirlitinum á vitjan á oljugoymlsuni hjá Effo í Søldarfirði.

Í Søldarfirði eru fýra stórir oljutangar, sum eru ein av oljugoymslunum hjá Effo í Føroyum.

Hvønn dag koyra tangabilar út til Søldarfjarðar at fylla í tangarnar, áðrenn farið verður út til kundarnar kring landið.

Og arbeiðsuppgávan hjá Jaspur Neshamar er at kanna, um oljuteljarin á pumpunum í Søldarfirði vísir rætt.

– Vit kalibrera teljiverkini á oljugoymsunum einaferð um árið, ella um oljufeløgini gera vart við, at tey hava illgruna um, at teljarin er farin av lagi, sigur Jaspur Neshamar, ið er maskinmeistari og eftirlitsmaður hjá Arbeiðseftirlitinum.

## Mekaniskt teljiverk

Teljiverkið er mekaniskt, og tað ger, at sum frá líður, so ávirkast teljarin av sliti og trýstinum. Bæði oljufeløgini og kundarnir hava áhuga í, at ein litur er ein litur. Pumpan við oljutangarnar í Søldarfirði pumpar 2400 litrar um minuttin.

Kalibreringin av teljiverkinum er sera einføld. Eftirlitið er at pumpa gjøgnum teljiverkið upp í ein av tangunum á bilinum og so lesa teljaran á pumpuni av og kanna um nøgdin í tanganum samsvarar við nøgdina í eftirlitstangunum á kalibreringsbilinum.

*Framhald á næstu síðu >>*




*Kalibreringsbilurin hjá Arbeiðseftirlitinum hevur fleiri tangar, sum verða brúktir at máta um teljarin vísir rætt*

Størsti tangin í bilinum er 2500 litarar. Markið fyri, nær teljarin kann góðkennast, er tvey promillu. Tað vil siga pluss-minus tveir litrar fyri hvørjar 1000 litrar.

– Vit kunnu fínjustera teljiverkið, men er brek á, so mugu oljufeløgini sjálv umvæla, og so koma vit aftur, sigur Jaspur Neshamar.

Fyri eitt húsarhald kann tað so merkja, at litratalið á seðlinum í postkassanum vísir einar tveir litrar meira ella minni enn tað, sum í veruleikanum er pumpað í oljutangan.

Men fyri stórar kundar ella skip, sum bunkra kanska 500.000 litrar, hevur tað størri týdning, at seljari og keypari hava álit á teljiverkinum og vita, hvat óvissan er. Góðkenda tvey promillu óvissan svarar til 1000 litrar av 500.000 litrum – ov nógv ella ov lítið.

## Altjóða góðkenning

Men eisini kalibreringsbilurin hjá Arbeiðseftirlitinum og arbeiðshátturin skulu vera álítandi.

Til hetta krevst aftur hægri góðkenning ella akkreditering.

Arbeiðseftirlitið arbeiðir saman við DANAK (Den Danske Akkrediteringsfond), sum liggur í danska Vinnumálaráðnum. DANAK stendur fyri akkreditering av øllum fyritøkum og stovnum í Danmark, sum brúka vekt og mát av ymsum slagi í sínum virksemi.

Høvuðsendamálið hjá Arbeiðseftirlitinum, í samstarvi við DANAK, er at skapa álit á tær tænastur, sum fyritøkur, ið brúka vekt og mát, veita.

Arbeiðið at akkreditera virki og fyritøkur er altjóða samstarv.

– Ein týðandi partur av hesum arbeiðinum er at tryggja sporførið. Í hesum sambandi er tað, at útgerðin, sum vit brúka, eisini er góðkend og kann førast aftur til atljóða góðkendar stovnar, sum standa inni fyri, at okkara arbeiði hevur altjóða standard, sigur Jaspur Neshamar.





*Framhald á næstu síðu >>*

**”Vit kalibrera teljiverkini á oljugoymlsunum einaferð um árið“**
Jaspur Neshamar

## Mát og vekt yvirtikið

Í 2008 samtykti løgtingið at yvirtaka málsøkið „Mát og vekt“. Men tað kann ikki sigast, at tað hevur broytt støðuna í Føroyum nakað – ein føroyskur litur er enn sama mát, sum ein altjóða litur – sama er við metrinum.

Til lógaruppskot í løgtingum verður altíð greitt frá, hvørjar avleiðingarnar eru, tá eitt mál verður yvirtikið, men viðmerkingarnar til yvirtøkuna av „Mát og vekt“ boðaðu ikki frá nøkrum broytingum. Somu donsku lógir, ið vóru galdandi áðrenn, skuldu galda.

Um arbeiðsuppgávurnar verður í viðmerkingunum nevnt, at Arbeiðseftirlitið umsitur økið mát og vekt. Í praksis merkir hetta, at Arbeiðseftirlitið kannar og verifiserar: 1. vektir og 2. volumenmátarar.

Hetta eru vektir til ymisk vinnulig endamál, sum til dømis í fiskivinnuni og í handlum, meðan volumenmátarar fyri tað mesta eru olju- og bensinmátarar á bensinstøðum og líknandi.

Herumframt eru nógv onnur viðurskifti at umsita, til dømis: Momentlyklar, betongstyrki, fjarhiti, elmálarar.



*Effo hevur fýra stórar tangar á oljugoymsluni í Søldarfirði. Tangarnir eru frá eingilsmonnunum undir krígnum*



*Jaspur Neshamar valdi at justera teljaran á bilinum eina striku, áðrenn blýggjinnsigli var sett á*

## Kanna tangabilarnar

Ein av tangabilunum hjá Effo er eisini í Søldarfirði hendan morgunin, tí tað er ikki nóg mikið, at pumpan á oljugoymlsuni vísir rætt. Teljiverkið á tangabilinum skal eisini vísa rætt, tá seðilin til kundan verður lagdur í postkassan. Bæði oljufeløgini hava einar 30 tangabilar, sum Arbeiðseftirlitið kannar á leið annaðhvørt ár.

Og kalibreringin av teljaranum á tangabilunum er eisini einføld.

Tangabilurin pumpar 500 litrarar í ein av tangunum á kalibreringsbilinum hjá Arbeiðseftirltinum.

Hetta var gjørt nakrar ferðir, og hendan morgunin lá vísarin beint á markinum, men Jaspur Neshamar valdi at justera eina striku, og teljarin var blýggjinnsiglaður ella plomberaður til næstu kanning.

– Tað er sjáldan, at vit renna okkum í stórar munir. Oljufeløgini hava eisini gott eftirlit við sínum goymslum og pumpum og hava áhuga í, at góðkenningarnar eru í lagi, sigur Jaspur Neshamar.

Umleið annaðhvørt ár verða eisini pumpurnar á bensinstøðunum kalibreraðar.

## Eitt kilo er eitt kilo

Umframt eftirlit við liturteljarunum hjá oljufeløgunum eru fleiri aðrar fyritøkur, sum selja vørur og tænastur, sum skulu vigast ella mátast.

Arbeiðseftirlitið hevur eisini eftirlit við, at allar vektir hjá fyritøkum og virkjum er rættar.

Fiskavirki, flakavirki, laksavirki, apotekið og matvøruvirki selja vørur eftir vekt, og eisini har er umráðandi, at kundin hevur álit á, at vektirnar vísa rætt.

Summir stórir keyparar – ofta útlendskir fiskakeyparar – krevja eina sertifikasjóns-váttan frá seljaranum. Tað vil siga, at keyparin vil hava at vita, nær vektin seinast er kalibrerað, og hvør sertifikasjóns-myndugleiki hevur staðið fyri tí.

Eisini eftirlitið við vektunum er einfalt. Arbeiðseftirlitið hevur trý tons av loddum í ymsum støddum. Tyngsta er 500 kilo. Eftirlitið er reint fysiskt, har eitt av loddunum hjá Arbeiðseftirlitinum verður sett á vektina hjá virkinum og síðani lisið av, um vektin vísir tað, hon skal.

Men loddini eru ikki bara gjørd so hissini. Tey hava kotur, so sporføri er í lagi. Í roynd og veru vísir sporførið, at vektin á loddunum kann førast aftur til upprúna-kiloloddið, sum stendur í París. Eisini loddini verða kannað við jøvnum millumbilum.





*Í norsku oljuvinnuni finnast tey at versnandi heilsu- og trygdarviðurskiftunum í vinnuni*

# Trygdin í norsku oljuvinnuni versnað

**Strong trygdarkrøv hava í mong ár verið eyðkenni fyri norsku oljuvinnuna, og júst trygdin hevur verið norska flaggskipið í alheims oljuvinnuni. Nú er vent í holuni, halda norskir oljumyndugleikar**

**TEKSTUR:** GRÆKARIS DJURHUUS MAGNUSSEN / grakaris@press.fo
**MYNDIR:** ÓLAVUR FREDERIKSEN / FAROEPHOTO

Í nógv ár hava hørðu trygdarkrøvini í norsku oljuvinnuni verið stoltleikin hjá hesi somu vinnu. Men seinnu árini er slakað í krøvunum, og nú verður rópt varskó. Millum harðastu atfinnararnar at slakaðu krøvunum er norksa Oljueftirlitið, Ptil. Oljueftirlitið hevur sett 2017 sum árið, har gongdin við krøvunum verður vend aftur til tað betra.

Millum føroyingar, sum arbeiða ella hava arbeitt í norsku oljuvinnuni, hava strongu krøvini á øllum økjum í vinnuni, bæði umborð á veitingarskipum og á oljupallunum, verið væl kend. Almenna norska oljufelagið, Statoil, er kanska tann „stovnurin", ið hevur ment krøvini mest tey nógvu árini, norðmenn hava leitað eftir olju.

Vit hava tosað við tveir føroyingar, sum arbeiða í norsku oljuvinnuni, ein elektrikara og ein maskinmeistara. Teir eru ósamdir við norsku oljumyndugleikarnar um, at slakað er í trygdarkrøvunum. Teir eru hinvegin á einum máli um, at krøvini í norsku oljuvinnuni, um nakað, eru alt ov strong. Teir vilja báðir vera ónevndir orsakað av arbeiðsstøðu teirra í Noregi.

– Sannleikin er tann, at vit fáa illa arbeitt fyri paragraffum, sigur føroyski maskinmeistarin, sum hevur arbeitt innan oljuvinnuna í nógv ár, seinastu árini í norskum øki.

Føroyski elektrikarin er onki mjúkari.

– Veruleikin er tann, at tað, vit fyrr róptu „sunna fornuft", er blakað fyri borð. Her eru tað paragraffir omaná paragraffir, ið stýra arbeiðinum fullkomiliga, heldur hann.

*Framhald á næstu síðu >>*

*Framhald á næstu síðu >>*




*Slakað er í trygdarkrøvunum bæði á boripallum og umborð á til dømis frálandaskipum, siga norskir oljumyndugleikar*

Teir vísa sostatt báðir aftur, at slakað er í trygdini í norsku oljuvinnuni. Men norskir myndugleikar hava heilt aðra fatan, slakað er í trygdini, og tað sæst millum annað í einum størri tali av vanlukkum. Og tann gongdin skal vendast sum skjótast, siga norskir myndugleikar.

– Vit síggja eitt rák, har títtleikin á vanlukkum í vinnuni bara økist. Orsøkin er vantandi viðlíkahald og vantandi tal á arbeiðsfólkum, fólk, sum nú noyðast at hava fleiri uppgávur enn fyrr, sigur Odd Rune Malterud, fakligur leiðari í norska Maskinmeistarafelagnum, DNMF.

Odd Rune Malterud sigur við Maskinmeistaran, at hann óttast, at trygdin í framtíðini verður bara helvtina so góð, sum hon hevur verið.

## Byrjaðu í 1966

Fyrsta veruliga oljuboringin á norska landgrunninum var í 1966, og síðan hevur trygdin gingið sum ein reyður tráður í norsku oljuvinnuni. Gongdin var góð fyrstu fimmti árini, men seinastu tvey árini meta norskir myndugleikar altso, at alt ov nógv er slakað í trygdini.

Norska Oljueftirlitið sigur á heimasíðu síni, at neyðugt er at venda gongdini til tað betra á fleiri økjum, tá tað snýr seg um trygdina, millum annað í samstarvinum millum ymsu partarnar í vinnuni.

Fakfelagið Energi-Industri, sum er fjórðstørsta felagið í norska OL, og sum er fakfelag fyri arbeiðsfólk í oljuvinnuni, heldur tað eisini vera slakað ov nógv í trygdini. Energi-Industri heldur støðuna vera so álvarsliga, at felagið ivast í, um norska Oljueftirlitið yvirhøvur megnar at venda gongdini. Fakfelagið krevur, at Ríkisgrannskoðanin fer at kanna Oljueftirlitið nærri, tí alt ov nógvar vanlukkur eru hendar í oljuvinnuni seinastu tíðina – serliga hetta seinasta árið, heldur Energi-Industri.

## Gongdin skal vendast

Loysunarorðið ella herrópið í átakinum hjá norska Oljueftirlitinum er „Gongdin skal vendast“.

– Hetta gera vit, tí vit óttast av álvara skeivu gongdina. Vit síggja stórar broytingar í oljuvinnuni, tað hava til dømis verið fleiri álvarsligar hendingar hetta seinasta árið. Tað gongur heilt greitt skeiva vegin, sigur Anne Myhrvold, stjóri í Oljueftirlitinum.

Eitt annað av starvsfólkunum í Oljueftirlitinum, Elisabeth Loothz, tekur undir við stjóra sínum, og vísir á fleiri øki, ið benda á, at slakað er í trygdini.

– Vit síggja, at oljufeløgini hava broytt retorikk. Í dag siga tey mangan, at tingini er „nóg góð“. Retoriskt sæð sært tú onga tráan eftir at gerast betri á heilsu- og trygdarøkinum. Tá ið oljufeløg fyrr hava gjørt ymsar broytingar, hava tey samstundis sett sær heilt greið og høg mál á heilsu- og trygdarøkinum, men tað síggja vit ikki longur, sigur Elisabeth Loothz.

Hon sigur, at eisini tá tað kemur til samstarv millum partarnar í oljuvinnuni, er gongdin neilig. Nýggj starvsfólk fáa til dømis minni upplæring og minni innlit í trygdarviðurskifti í dag, enn tey hava fingið.

– Hetta førir til, at longri er millum góð uppskot, sum kunnu betra um viðurskiftini, og hevur eitt starvsfólk okkurt gott

> **”Trygd er bara eitt fínt orð, tað er altíð peningurin, ið ræður“**
> Odd Rune Malterud

*Nýggj starvsfólk fáa minni upplæring og minni innlit í trygdarviðurskifti í dag, enn tey hava fingið, halda norskir oljumyndugleikar*








**”Okkum hevur ikki dámt allar broytingarnar, tí vit meta, at fleiri broytingar eru gjørdar fyri at spara pening í staðin fyri at hugsa meira um trygdar– og heilsuviðurskiftini“**

Industri-Energi

hugskot, so veit viðkomandi snøgt sagt ikki, hvør skal hava uppskotið, altso, vegurin til betri viðurskifti er vorðin longri og ógreiðari, sigur Elisabeth Loothz.

## Trygd og upplæring

Fakfelagið Industri-Energi sigur í einari heilsu– og trygdarpolitiskari frágreiðing, at ongin ivi er um, at trygdarviðurskifti og upplæring í oljuvinnuni skulu styrkjast. Felagið sigur, at stórar broytingar eru gjørdar í Norsk Olje og Gass-leiðbeiningum síðan 2013.

– Okkum hevur ikki dámt allar broytingarnar, tí vit meta, at fleiri broytingar eru gjørdar fyri at spara pening í staðin fyri at hugsa meira um trygdar– og heilsuviðurskiftini. Vit bera ótta fyri, at nógvar av hesum broytingum hava ført til – og fara at føra til, at heilsu– og trygdarviðurskiftini versna uppaftur meira, sigur Industri-Energi í frágreiðingini.

Fakfelagið hjá starvsfólkum í oljuvinnuni ásannar, at trýstið á kostnaðin á mongum økjum er økt. Tað sæst millum annað við nógvum uppsagnum; at fólk eru send í farloyvi, minkandi starvsfólkatal, og at endaligu úrslitini hava verið verri.

– Serliga á heilsu– og trygdarøkinum síggja vit avleiðingarnar. Minni peningur er settur av til viðlíkahald, krøv í sambandi við arbeiðssáttmálar eru linkað og so framvegis, sigur Industri-Energi.

Elisabeth Loothz, Oljueftirlitið, sigur, at fyrr vóru rættiliga fáar fráboðanir frá arbeiðsfólkum, sum vóru ónøgd við viðurskifti í oljuvinnuni, men tað er eisini broytt.

– Nú fáa vit nógvar ferðir fleiri slíkar fráboðanir, og tær eru samstundis meira umfatandi, sigur hon.

Fráboðanirnar snúgva seg millum annað um viðurskifti, har vandi er fyri størri vanlukkum. Talið á slíkum fráboðanum er nógv hægri í dag, enn tað hevur verið undanfarin ár.

Fakligi leiðarin í norska Maskinmeistarafelagnum, Odd Rune Malterud, er ikki í iva um, hvat skal til fyri at venda gongdini soleiðis, at trygdin aftur kemur í hásætið:

– Peningur og fleiri starvsfólk við rættari útbúgving, sigur hann við Maskinmeistaran.

Hann leggur aftrat, at orsøkin til, at trygdin er versnað seinastu tíðina, eru vánalig fíggjarviðurskifti.

– Trygd er bara eitt fínt orð, tað er altíð peningurin, ið ræður, sigur hann.





*Formaðurin í Maskinmeistarafelagnum og limur í arbeiðsbólkinum „Sjóvinnupolitikkur 2017", Páll Hansen, fegnast um, at útbúgving og shipping-vinna hava fingið so gott pláss í frágreiðingini*

# Fegnast um orðaðan sjóvinnupolitikk

**Formaðurin í Maskinmeistarafelagnum er væl nøgdur við úrslitið, nú sjóvinnupolitikkurin fyri 2017 er orðaður. Útbúgving og shippingvinna eru millum evnini, ið verða raðfest frammarlaga í frágreiðingini**

TEKSTUR & MYNDIR:
GRÆKARIS DJURHUUS MAGNUSSEN / grakaris@press.fo

„Grundleggjandi fyri at føroysk sjóvinna kann mennast, er at yvirskipaðu karmarnir eru væl skipaðir. Tað snýr seg um at hava einfaldar og kappingarførar karmar – bæði fíggjarliga og í dygd. Tað hevur týdning, at tey, ið ætla at fara undir virksemi innan hesa vinnugrein í Føroyum, hava atgongd til kapital og ráðgeving, eins og tað er týdningarmikið at bjóða fram dygdargóðar útbúgvingar og skeið soleiðis, at fleiri og vitanartung størv verða skapt í vinnuni."

Hetta er nakað av tí, sagt verður í niðurstøðuni og tilmælinum hjá arbeiðsbólkinum, sum hevur orðað „Sjóvinna – Sjóvinnupolitikkur 2017". Ein av limunum í arbeiðsbólkinum var Páll Hansen, formaður í Maskinmeistarafelagnum. Hann fegnast millum annað um, at sjóneyka varð sett á útbúgving í arbeiðinum hjá arbeiðsbólkinum. Páll Hansen umboðaði FMU, Faroese Maritime Unions, í hesum arbeiðnum.

– Sum sjóvinnutjóð burturav eiga Føroyar at vera í fremstu røð innan maritimar útbúgvingar. Tí er tað alneyðugt at hava eina greiða strategi fyri maritimar útbúgvingar, soleiðis at verandi útbúgvingarstovnar verða fult gagnnýttir, verður sagt í frágreiðingini.

*Framhald á næstu síðu >>*

*Glasir kundi hóskandi farið undir eina shipping-útbúgving, heldur arbeiðsbólkurin, sum hevur gjørt frágreiðingina „Sjóvinnupolitikkur 2017*



– Vit fegnast tískil um, at tað er komið so langt við ætlanunum at broyta maskinmeistaraútbúgvingina til bachelorútbúgving, tí við einari bachelorútbúgving fært tú aðrar og nýggjar møguleikar, sigur Páll Hansen.

Hann vísir á, at til ber eisini at lesa víðari, og soleiðis byggja uppá bachelorútbúgvingina.

– Til dømis er møguleiki at útbúgva seg víðari til skipsverkfrøðing og líknandi útbúgvingar, sigur hann.

Í frágreiðingini verður víst til aðrar frágreiðingar og álit, sum gjørd eru á útbúgvingarøkinum í Føroyum fyrr, millum annað í 2006, tá Álit um bachelorútbúgving á Vinnuháskúlanum varð gjørt. Har stendur millum annað:

„Maritimu útbúgvingarnar hava alla tíðina, síðani tær komu fyri eini øld síðani, ment seg við samfelagsgongdini. Gongdin í dag í Føroyum og øllum Evropa er, at allar hægri útbúgvingar verða skipaðar eftir Bolognaavtaluni. Í grannalondunum eru hægri maritimar útbúgvingar á bachelorstøði, og í Føroyum eru og verða fleiri bachelorútbúgvingar. Føroysk sjófólk eiga at fáa sama møguleika sum aðrir føroyingar og sum sjófólk í grannalondunum. Hesa niðurstøðu koma Vinnuhúsið og føroyskir politikarar eisini til í viðgerðini av Visjón 2015,"

verður millum annað sagt í frágreiðingini frá 2006.

Út frá millum øðrum omanfyri nevnda broti úr áliti frá 2006 mælir arbeiðsbólkurin við Sjóvinnupolitikki 2017 til, at føroysku skipsførara– og maskinmeistaraútbúgvingarnar verða broyttar til bachelorútbúgvingar.

## Shippingvinnan

Í frágreiðingini verður eisini nomið við shippingvinnuna ella farmaflutningsvinnuna, sum tað eisini verður rópt. Hans Jóhannus á Brúgv, stjóri í Sjóvinnustýrinum, hevur í fleiri ár víst á møguleikan at útbúgva fólk, sum kunnu fara inn í shippingvinnuna.

– Her eru stórir møguleikar hjá væl fyrireikaðum og útbúnum føroyingum, hevur Hans Jóhannus á Brúgv fleiri ferðir víst á.

Og formaðurin í Maskinmeistarafelagnum er samdur við stjóran í Sjóvinnustýrinum.

– Í Esbjerg veit eg, at tey koyra við einari shipping-útbúgving, ið tekur 2 ár. Stórur tørvur er á fólki í Føroyum, sum kann fara í hesa vinnuna, og tí kundi ein líknandi



*Arbeiðsbólkurin við „Sjóvinna – Sjóvinnupolitikkur 2017" til arbeiðis*



*Arbeiðsbólkurin avmyndaður á Kongabrúnni eftir lokið verk. Úr vinstru eru tað Esther Dahl, ráðgevi fyri Reiðarafelagið fyri Farmaskip, Páll Hansen, formaður í Maskinmeistarafelagnum, Wilhelm Petersen, stjóri á Vinnuháskúlanum, Jens Meinhard Rasmussen, formaður í Reiðarafelagnum fyri Farmaskip, Petur Alberg Lamhauge, ráðgevi í Fíggjarmálaráðnum, Poul Michelsen, uttanríkis- og vinnumálaráðharri, Niclas Hovgaard, fulltrúi í Mentamálaráðnum, Hans Johannes á Brúgv, stjóri í Sjóvinnustýrinum, Anna Borg Dahl, ráðgevi í Uttanríkis- og Vinnumálaráðnum, og Gunvør Balle, fulltrúi í Uttanríkis- og Vinnumálaráðnum.*
*Mynd: Páll Nolsøe*

útbúgving, sum tann í Esbjerg, verðið sett á stovn í Føroyum, heldur Páll Hansen.

Sagt verður í frágreiðingini „Sjóvinnupolitikkur 2017“:

„Føroyska arbeiðsmegin innan sjóvinnu og tænastur til sjóvinnuna hevur góðar tekniskar førleikar, og fleiri og fleiri nema sær førleikar innan logistikk. Men fyri at shippingvinnan kann mennast, er serliga tørvur á handilsligum førleikum. Tí er alneyðugt, at útbúgvingar og skeið innan shipping og annað maritimt virksemi verða ment á øllum økjum.“

Arbeiðsbólkurin heldur, at Mentamálaráðið, saman við miðnámsskúlunum, eigur at gera tað møguligt hjá fólki, ið ikki ganga á miðnámi, at taka ávísar lærugreinar á miðnámsstøði, sum teimum tørva fyri at fara undir hægri útbúgving. Her verður víst á tað, danir rópa „gymnasialt suppleringskursus“.

– Vit halda eisini, at Mentamálaráðið og handilsskúlarnir eiga at fyrireika og bjóða shippinglærugreinar út. Tað kundi kveikt áhugan fyri shippingvinnuni. Sum nú er, liggur shippingsektorin í øðrum londum, hann liggur ikki í Føroyum. Tí er neyðugt onkursvegna at menna fólk til shippingvinnuna. Tá so Glasir veruliga er komið í gongd, kundu vit hugsað okkum, at tann útbúgvingarstovnurin fer undir at skipa eina shipping-útbúgving sum hana í Esbjerg, sigur Páll Hansen.

Shippingvinnan tekur sær av farmaflutningi kring um í heiminum.



## Aldursmark á skipum

Í arbeiðsbólkinum varð komið inn á aldurin á skipum, sum eru í Føroysku Altjóða Skipaskrásetingini, FAS. Her var ósemja um aldursmarkið. Onkur hevði hug at broyta aldursmarkið.

Í frágreiðingini verður víst á, at løgtingslóg um FAS á vári í 2011 varð broytt soleiðis, at Sjóvinnustýrið fekk heimild at nokta skipum omanfyri ávísan aldur at verða skrásett í FAS. Men heimild varð kortini at geva undantak frá ásetingini um sonevnda „20-ára aldursmarkið“. Tá varð hildið neyðugt at hava 20-ára aldursmarkið fyri at sleppa undan fleiri neiligum viðmerkingum og ásetingum, sum kundi hava við sær, at føroyska flaggið fór longur niður á gráa listanum hjá Paris Mou.

Niðurstøðan hjá bólkinum varð, at „Nevndin ikki var á einum máli um, hvørt sonevnda „aldursmarkið“ í lógini eigur at verða endurskoðað soleiðis, at størri dentur verður lagdur á rakstrarsøguna hjá skipinum heldur enn aldurin.“

– Hinvegin er semja um, at vit eiga at menna FAS-skipanina við millum annað at seta fleiri starvsfólk. Tað er alneyðugt, at FAS verður marknaðarført betur, og tað merkir, at fleiri fólk skulu til, sigur Páll Hansen.

Neyðugt er at koma longur út í heim at selja FAS, og tí er neyðugt við fleiri sølufólkum. Í frágreiðingini verður millum annað sagt um marknaðar partin í FAS:

„Bygnaðarliga liggur umsitingin av FAS, herundir marknaðarføring av skipanini, í Sjóvinnustýrinum saman við aðrari umsiting, ið hevur við innflagging av skipum at gera, t.e sýnsdeildini og manningardeildini. Upprunaliga vóru FAS og Sjóvinnustýrið skipað sum tveir sjálvstøðugir stovnar, men í 2010 varð

**”Maritimu útbúgvingarnar hava alla tíðina, síðani tær komu fyri eini øld síðani, ment seg við samfelagsgongdini“**

avgerð tikin um at leggja stovnarnar saman. Grundgevingin var, at FAS var ein ov lítil stovnur, og fakliga umhvørvið og virksemið sum heild hóskaði væl saman við virkseminum í Sjóvinnustýrinum.“

„Kjakast kann verða um, hvørt tað er rætt at hesir stovnar liggja saman undir einari leiðslu. Ein spurningur, sum er reistur, er, at tað kann hava við sær gegnistrupulleikar, at sami stovnur umsitur sølu og marknaðarføring av einari skipaskrá og samstundis skal góðkenna innflaggingar av skipum út frá reglum viðvíkjandi trygd. Arbeiðsbólkurin er tó komin til ta niðurstøðu, at hóast ávísir vansar kunnu vera við verandi bygnaði, eru tað tó fleiri fyrimunir við at halda fast við hesa skipan. Millum annað orsakað av einum sterkari fakligum umhvørvi, og tí tað ikki er skynsamt at hava nógvar smáar fyrisitingarligar eindir,“ stendur í frágreiðingini.

## Eina maritima leiðslu

Í mong ár hava vit havt tvey maritim útbúgvingarstøð í Føroyum, Vinnuháskúlan í Havn og Sjónám (fyrr Klaksvíkar Sjómansskúli) í Klaksvík.

Arbeiðsbólkurin vísir á, at trý ymisk álit eru gjørd seinastu 10 árini um bygnaðin innan maritimu útbúgvingarnar. Øll álitini mæla til at hava Vinnuháskúlan og Sjónám undir einari og somu leiðslu, men hesir útbúgvingarstovnar hava framvegis hvør sína leiðslu.

Arbeiðsbólkurin, sum nú hevur snikkað „Sjóvinnupolitikkin 2017“ til, er samdur við nevndu álit um eina leiðslu. Men bólkurin leggur seg ikki út í, hvar í landinum ymsu útbúgvingartilboðini eru staðsett.

Tilmælið hjá arbeiðsbólkinum er:

„Mælt verður til, at farið verður undir at fremja tey átøk og tilmæli, ið hetta og eldri frágreiðingar mæla til um bygnað og innihald í maritimum útbúgvingum, herundir at báðir skúlarnir verða skipaðir í ein stovn við einari leiðslu, soleiðis at vit fáa økta menning og skilabetri rakstur.“

*Formansfrágreiðingin:*

# Sjóvinnustýrið/FAS fyri atfinningum

**Í síni formansrøðu á aðalfundinum hjá Maskinmeistarafelagnum 18. mars fanst Páll Hansen harðliga at Sjóvinnustýrinum/FAS fyri í fleiri førum at slaka upp á krøvini fyri at ganga ávísum reiðaríum og handilsskipabólkum á møti og fyri bara lata standa til í FOC-spurninginum**

**TEKSTUR:** INGOLF S. OLSEN / ingolf@press.fo

Maskinmeistarafelagið fýlist á eftirlæti hjá Sjóvinnustýrinum/FAS í fleiri málum, og kom ónøgdin týðuliga til sjóndar í formansrøðuni á aðalfundinum.

Páll Hansen nevndi skipini hjá Fjord Shipping sum dømi um, at ynski hjá reiðaríum verða tikin fram um fyriskrivaðar mannagongdir. Her var framtøkumegin á skipunum Silver Lake og Silver River minkað við einum kilowatt (kW) – úr 3000 niður í 2999 kW – so at skipini kundu hava minni manning í maskinrúminum.

– Hetta er gjørt eftir ynski frá norska reiðaranum. Hóast Sjóvinnustýrið/FAS sigur seg onki skeivt hava gjørt, haldi eg, at hettar er beinleiðis at misbrúka lógina, segði hann.

Páll Hansen setti stórt spurnartekin við sjálva mátingina av framtøkumegini í hesum førinum.

– Tað ber ikki til neyvt at máta pluss-minus eitt kW á einum stórum motori. Øll húsarhald í Føroyum hava ymisk tól, dustsúgvarar, kaffimaskinu, el-ketil og so framvegis, og felags fyri øll hesi tól er, at tey eru omafyri eitt kW.

– Hetta vísir, at har man fyrr hevði greiðar reglur, hevur man í dag óskil. Betur hevði verið um løggávan var endurskoðað, og at man setti eina minimum avmarking inn fyri at tálma misnýtslu soleiðis, at tað ongantíð var loyvt at lækka minni enn til dømis 30 prosent, segði hann.

## Aldursmark á skipum

Tað ørkymlar eisini formannin, at Sjóvinnustýrið/FAS vil slaka í treytunum um aldurshámark á skipum, sum verða skrásett í FAS.

Sambært lógini kunnu skip eldri enn 20 ár noktast at verða skrásett í FAS, men Sjóvinnustýrið/FAS hevur heimild at gera undantøk.

At hondhevja aldursmarkið hevur verið neyðugt fyri at fáa føroyska FAS-flaggið av gráa listanum hjá europeiska skipaferðslusamstarvinum Paris Mou.

Ásetingin í lógini um aldursmark hevur havt við sær, at Merkið skjótt vann seg upp á hvíta listan.

– Mett verður, at júst aldursmarkið er við til at tryggja, at góðskan á FAS-skipanini er á einum høgum støði. Men hettar vil Sjóvinnustýrið/FAS nú hava broytt. Myndugleikin tykist meina, at størri dentur eigur at verður lagdur á rakstrarsøguna hjá skipunum enn aldurin, og teir sokallaðu umboðsmenninir vilja helst, at onki aldursmark er, segði Páll Hansen í síni formansfrágreiðing.

Hann vísti á, at FAS sjálvt hevur ein málsetning um, at 150-200 skip skulu verða skráset í FAS áðrenn 2018. Tað er meira enn tað tvífalda av FAS-skipatalinum í dag. Eitt órealistiskt mál, um prísurin er, at slakað verður í krøvunum, sum annars hava tryggjað FAS eitt gott umdømi.

Hann vísti á, at miðalaldurin á skipunum í FAS í dag er 24 ár.

– Her er talan um vantandi løtuansni. FMU (Faroese Maritime Union – samstarvið millum tey trý manningarfeløgini, red.) tekur ikki undir við, at aldursmarkið verður broytt og hevur mótmælt. Eisini heldur FMU, at tað er sera óheppið, at stjórin í Sjóvinnustýrinun og í FAS er sami persónur, og hetta hava vit eisini gjørt vart við, segði Páll Hansen.

## Hentleikaflagg

Føroyska flaggið er skrásett sum FOC (Flag of Convinience – hentleikaflagg) hjá altjóða samgonguni av flutningsarbeiðarafeløgum ITF, og eisini í tí málinum heldur Páll Hansen, at føroyski sjóvinnumyndugleikin hevur sín part av skyldini.

– Maskinmeistarafelagið tekur ikki undir við avgerðini hjá ITF í hesum málinum. Men vit skilja tó partvís atfinningarnar hjá ITF og halda eisini, at føroyskir myndugleikar kunnu gera meira fyri at bøta um umdømið hjá FAS-flotanum. Millum annað við at seta fleiri krøv til teir, sum gerast umboðsmenn og fyrst og fremst at fáa eitt ella annað slag av løggilding.

– Krøv, sum vanliga verða sett til løggilding, eru av fakligum ella persónligum slagi, og stundum kunnu krøv verða sett um heimarætt, skráseting í Føroyum í tilsamans 5 ár og so framvegis.

Men tá tað kemur til at tosa um, hvussu komast kann burtur úr hesum, eru tað líka nógvar meiningar, sum krossfiskur hevur armar. Einki felagsstev er millum umboðsmenn, reiðarar og manningarfeløg ella myndugleikar, segði hann.

Hann segði eisini, at tað finnast bólkar innan skipanina sum halda, at FOC-skráseting er í lagi.

– Tað kann ikki vera rætt, at skip koma frá einum FOC-flaggstati til føroyska FOC-flaggið,



*Sjóvinnustýrið/FAS fekk av grovfýluni í formansrøðuni hjá Páll Hansen*

> ”Maskinmeistarafelagið strembar altíð eftir, at føroyska sjóvinnan er í fremstu røð, tá tað snýr seg um at fylgja altjóða ásetingum“
> Páll Hansen

uttan at FAS hevur kannað, um skipið yvirhøvur hevur nakran sáttmála við manningarfeløg í tí landi, har tann veruligi eigarin er, ella har samráðingarrætturin liggur.

– Við bert at siga, at hettar er ein fakfelagsspurningur, grevur FAS bara grøvina til ITF djúpri, segði formaðurin.

### Á tveimum rossum

Páll Hansen helt, at Sjóvinnustýrið/FAS tykist vilja ríða á tveimum rossum og samstundis geva einum triðja parti, manningarfeløgunum, sum onga ávirkan hava á innflaggingina, ábyrgdina av ólukkuligu støðuni, sum er íkomin.

– Her haldi eg, at myndugleikarnir greitt skuldu boðað frá, hvat man vil. Ynskir man at fáa nógv skip inn sum skjótast og blíva verandi á FOC, ella ynskir man at hava sum mál at royna at sleppa av FOC. Sum er, finst ongin málsetningur. FAS eigur at tryggja sær við skjalprógvum, at tey útlendsku skipini hava síni sáttmálaviðurskifti í lagi og ikki bert yppa øksl, segði Páll Hansen.

Hann legði dent á, at Maskinmeistarafelagið altíð strembar eftir, at føroyska sjóvinnan er í fremstu røð, tá tað snýr seg um at fylgja altjóða ásetingum.

– Lóg um sjófólk, lóg um trygd á sjónum og lóg um manning av skipum við tilhoyrandi kunngerðurm eru reglur, sum javnan verða tillagaðar orsakað av altjóða krøvum. Maskinmeistarafelagið tekur undir við øllum broytingum, sum eru altjóða ásettar, segði Páll Hansen.

## Skatta-FAS fer í søguna

Í Mið og Magn nummar 28, sum kom út í juli í fjør, var drúgv viðgerð av sonevnda skatta-FAS, sum er ein skipan í skattalógini, ið gevur bareboat leigaðum skipum uttanfyri FAS somu skattasømdir, sum FAS-skipini fáa.

Men nú verður skipanin tikin av. Tað samtykti Løgtingið einmælt 18. august.

Tað var Kristina Háfoss, fíggjarmálaráðharri, sum hevði lagt uppskotið fram um striking av skattaafturberingini til bareboat leigað skip, sum ikki eru í FAS. Høvuðsgrundgevingin var ynskið um at tryggja altjóða umdømi Føroya við atliti at altjóða skipaskráseting – altso at styrkja trúvirðið hjá FAS.

Tað tekur tó sína tíð, áðrenn skatta-FAS púra fer í søguna, tí skiftistíðin gongur heilt fram til 31. desember 2025.





Framhald á næstu síðu >>

# 19 maskinmeistarar fingu prógv

**Automatisering og digitalisering økir eftirspurningin eftir dugnaligum maskinmeistarum, segði Páll Hansen í síni røðu til prógvhandanina**

**TEKSTUR:** INGOLF S. OLSEN / ingolf@press.fo
**MYNDIR:** ERLAND HENTZE RASMUSSEN

Fríggjadagin 23. juni var prógvhandan á Vinnuháskúlanum í Havn, og millum teirra, sum fingu prógv vóru 19 maskinmeistarar.

Gestarøðari hesaferð var Jóan Pauli Joensen, professari, og fleiri onnur tóku eisini orðið.

Sum vant fingu nýklaktu maskinmeistararnir eisini nøkur orð við á vegnum frá Páll Hansen, formanni í Maskinmeistarafelagnum.

Hann røddi um stóru tøkniligu menningina, sum hevur verið, síðani fyrstu maskinurnar komu fram, og sum merkir, at tørvurin á maskinmeistarum bara økist.

Her er ein samandráttur av røðu formansins:

„Hóast maskinmeistaraútbúgvingin tradisjonelt var málrættað skipum við stoltari siðvenju heilt aftur til dampmaskinaríið, síggja vit í dag eitt arbeiðsøki í skjótari menning. Bæði á sjógvi og landi.

Tí krevst tað, at maskinmeistarar eru væl fyrireikaðir til hesa skjótu tøkniligu menningina og skjóta vøksturin og herðingina av ymsjum krøvum, millum annað umhvørviskrøvum, sum vit síggja í dag.

Tann vaksandi automatiseringin hevur eisini stóra ávirkan á arbeiðið hjá einum maskinmeistara í dag.



*Jóan Pauli Joensen, professari, var gestarøðari*



*Sum altíð var stúgvandi fult av fólki í Skálanum til prógvhandanina. 19 maskinmeistarar, 18 skipsførarar og seks skiparar fingu prógv hesaferð*



*Maskinmeistarar summar 2017: Torkil Sørensen, Pól Norðberg, Sverri Anbjørnsson, Jógvan Jacobsen, Steintór Fagradal, Trygvi Ljósá Østerø, Kári Skála, Rógvi Berg, Signar í Frammistovu, Robert Sørensen, Rúnar Strøm Debes, Eyðun Ólavur Sørensen, Guttormur Jóan Petursson Olsen, Fríði Magnusson Olsen, Stefan Martin Viderø Poulsson, Ólavur Dam Haraldsen, Vilhelm Gustav Hentze, Rani Mikkelsen og Pætur Nielsen.*
*Virðislønir:*
*1. Rúnar Strøm Debes, fartelefon frá Suðuroyar Sparikassa.*
*2: Steintór Fagradal, mátitól frá Maskinmeistarafelagnum.*
*3: Jógvan Jacobsen, grindaknív frá SEV.*
*Ídnisvirðisløn: Jógvan Jacobsen, gullur frá A.P. Møller.*

Automatiseringin og digitaliseringin ger eisini tað, at tað vissuliga verður brúk verður fyri fleiri dugnaligum maskinmeistarum í framtíðini.

Tí fylgja tey skandinavisku feløgini í dag sera væl við menningini av teimum autonomu – mannleysu – skipunum, og semja er um, at STCW-konvensjónin eigur at verða grundstøði hjá teimum, sum koma at hava ábyrgd av hesum skipum.

Sum sjóvinnutjóð burturav eiga Føroyar at vera í fremstu røð innan útbúgvingar á maritima økinum.

Fyri at tryggja, at útbúgvingarnar hava førleikar til framtíðar tørvin, er tað umráðandi, at høga støðið á teimum siðbundnu maritimu útbúgvingunum verður varðveitt og ment.

Eitt stig á hesi leið er, at lyfta útbúgvingarnar upp á bachelor-støði.

Innan shipping vanta útbúgvingartilboð at menna FAS-skipanna meira, og fyri at røkka hesum máli eiga miðnámsskúlarnir longu nú at fara at bjóða útbúgving í shipping. Ein av málsetninginum hjá Maskinmeistarafelagnum er at vera við til at styrkja FAS, so vit fáa fleiri arbeiðspláss bæði á sjógvi og landi.

Dagurin í dag er tykkara saman við familju og kenningum, og vil eg ynskja tykkum øllum hjartaliga tillukku, blíðan byr og góða eydnu við próvnum."



**”Innan shipping vanta útbúgvingartilboð at menna FAS-skipanna meira, og fyri at røkka hesum máli eiga miðnámsskúlarnir longu nú at fara at bjóða útbúgving í shipping“**

Páll Hansen




*Framhald á næstu síðu >>*



*Maskinmanningin á Sjúrðarberg henda túrin. Úr vinstru eru tað Jóannes Olsen, Daniel Nielsen og Olgar Jan Lervig*

# Ein túrur í Barentshavinum – sæddur úr kjølinum

**Daniel Nielsen, maskinmeistari á Sjúrðarbergi, hevur skrivað hesa hugvekjandi greinina um gerandisdagin og huglagið umborð á Sjúrðarbergi ein túr í Barentshavinum**

**TEKSTUR:** DANIEL NIELSEN
**MYNDIR:** TORKIL HØJSTED

Tað er morgun tann 9. apríl 2016, og eftir eina langa nátt umborð á Sjúrðarberg, er tað nú komið lív í tann gamla MAN B&W í maskinrúminum. Eg seti sentrifuguna í gongd, og hoyri, hann bakkar út frá kaiini. Nú standa teir helst uppi á dekkinum og veittra til familjuna. Tað er ikki altíð so lætt at fara avstað, men um nakrar tímar hava vit vant okkum við tað, og lívið er aftur, sum tað var síðsta túr.

Vit leggja leiðina í norskan sjógv at fiska tað, sum eftir er av upsakvotu. Her er so gott veður, at vit sita tað mesta av frívaktini á yvirdekkinum og spæla tónleik. Tað er tó ringt at fylla skipið við at syngja fyri havinum, so trolið verður koyrt út fyri at betra um hesa støðuna.

Hendan túrin havi eg náttarvaktirnar, sum ikki er so galið fyri eitt b-menniskja sum meg. Fyri tað mesta ganga vaktirnar gott við smærri ábótum. Maskinrúmið er gott og gamalt. Tað hevur sína sjarmu at synkronisera við hond, passa veskutrýst á frystarínum



*Andakt og sangur í messuni*



*Tað er hugaligt at arbeiða, tá fiskur er at fáa*

og at vita, at einki interface á nakrari PLC fer at spæla hund. Vit pussa tó ikki messing her allíkavæl.

Eftir tveimum vikum í norskum sjógvi, sigla vit nú norð í Svalbard-sonuna. Her er nakað av ísi, sum kemur rekandi, nú várið er komið. Fiskiskapurin her er góður, og vit úr maskinuni royna at hjálpa til í fabrikkini fyri at fáa so nógv í lastina sum til ber, meðan nakað er at fáa. Eg havi tó mínar tankar, um at eingin er imponeraður av mínum handalagi við knívi.

Ein vika gongur uppá hendan mátan, men so steðgar fiskaríið brádliga, og trolið kemur á dekkið við so gott sum ongum í. Nú er nokk av tíð til at taka sær av skipinum. Dekkararnir koma mannsterkir niður í maskinuna at hjálpa til við at vaska. Tað má eita „tvørfakligt samstarv“.

Dagarnir ganga við skiftandi fiskaríi. Ein hevur hug at kenna seg sum í einari bløðru av stillstandandi tíð, har dagur og nátt ikki eru til at skyna á. Tað er týdningarmikið, tá ein er á sjónum, ikki at hyggja ov nógv í kalendaran, men heldur gleða seg til tær smáu hendingarnar, sum hvør dagur hevur at bjóða – sum til dømis góðan morgunmat, møguleikan at ringja heim og reinar hosur á middegi.

Skipið hevur riggað væl hendan túrin, til ta einu náttina. Meðan vit sigla, leggi eg til merkis, at spenningurin er alt ov høgur á talvuni, og hann nærkast 500 voltum. Løtu seinni er alt myrkt umborð; bert neyðljósini lýsa dimt í maskinrúminum. Høvuðsmotorurin koyrur tó víðari, sum um einki er hent, og eg hugsi við mær sjálvum, at her er bara heilt hugnaligur jólastemningur.

Eftir at hava startað hjálpimotorin og fingið ljós á skipið aftur, fáa vit nú tíðina at ganga við at kanna akselgeneratorin og hesa hendingina. Vit fáa eisini fiska víðari, og tað gongur rætta vegin við tonsatalinum í lastini.

Tann 27. mai er lastin fylt upp, og kósin verður sett heimeftir. Tann 31. mai 2016 leggja vit at í Klaksvík, og familjan tekur ímóti okkum. Yngsta dóttur mín er blivin tvey ár, meðan eg havi verið burtur, og nú haldi eg, hon byrjar at kenna meg heilt væl aftur, og hon veit eisini, hvar hon skal leita eftir sjokulátakeksum, tá hon kemur umborð.

Eg eri takksamur fyri enn ein góðan túr og gleðist yvir at vera heima aftur hjá mínum kæru.

www.cig.fo



Rein góðska úr norður Atlantshavi

Norðhavnin 8 · Postboks 329 · FO-726 Ánirnar · Føroyar
Tel. +298 20 70 00 · Fax +298 20 70 10 · T-postur: cig@cig.fo · www.cig.fo




ELDRIVIN SPØL FRÁ IBERCISA

KSS ER UMBOÐ FYRI IBERCISA Í FØROYUM

KSS ER UMBOÐ FYRI IBERCISA Í FØROYUM, DANMARK, GRØNLANDI, SVØRÍKI, ONGLANDI, SKOTLANDI, ÍRLANDI, ÍSLANDI OG NORRA.

FLEIRI FYRIMUNIR, LÆGRI KOSTNAÐUR

Eldrivnu spølini frá Ibercisa eru at finna umborð á yvir 120 trolarum kring heimin. Spølini hava fingið avbera góð ummæli. Spølini hava minni tørv á orku, og eru harvið bíligari í rakstri og meira umhvørvisvinarlig.



Ynskir tú at hoyra meira um eldrivnu spølini? Set teg í samband við okkum.

+298 472030 KSS@KSS.FO WWW.KSS.FO

KSS KLAKSVÍKAR SLEIPISTØÐ



# *FØÐINGARDAGAR*
## *Maskinmeistarafelagið:*

| | | | |
|---|---|---|---|
| Einar Djurhuus | Tórshavn | 30/8-1937 | 80 ár |
| Mikkjal Absalonsen | Tórshavn | 18/8-1947 | 70 ár |
| Anfinn Mikkelsen | Søldarfjørður | 23/9-1947 | 70 ár |
| Jógvan Martin S. Joensen | Strendur | 16/10-1947 | 70 ár |
| Esmar Elttør | Klaksvík | 11/9-1957 | 60 ár |
| Petur Egholm | Tórshavn | 15/10-1957 | 60 ár |
| Høgni Waag Høgnesen | Toftir | 27/10-1957 | 60 ár |
| Rói Joensen | Kvívík | 18/9-1967 | 50 ár |
| John A. Vilhelmsen | Vestmanna | 21/9-1967 | 50 ár |
| Høgni Müller | Nuussuuaq, Grønland | 14/10-1967 | 50 ár |
| Alexandur Abrahamsen | Fuglafjørður | 18/10-1967 | 50 ár |
| Høgni á Lakjuni | Fuglafjørður | 5/8-1977 | 40 ár |
| Óli Súni Hansen | Hoyvík | 21/8-1977 | 40 ár |
| Johannes Ó. Johannesen | Vestmanna | 22/8-1977 | 40 ár |
| Poul Nolsøe Sørensen | Norðragøta | 26/9-1977 | 40 ár |
| Hans Mikal á Fløtti | Klaksvík | 18/10-1977 | 40 ár |
| Niels Thomsen | Tórshavn | 20/10-1977 | 40 ár |
| Heri Hansen | Fuglafjørður | 9/8-1987 | 30 ár |
| Mortan Olsen | Hósvík | 9/9-1987 | 30 ár |
| Eilif á Skansa | Syðrugøta | 27/9-1987 | 30 ár |
| Regin N. Johannesen | Tórshavn | 16/10-1987 | 30 ár |

## FELAGIÐ SKAL HAVA NÝGGJAN FORMANN

Maskinmeistarafelagið skal hava nýggjan formann. Tað er greitt, nú sitandi formaður, Páll Hansen, hevur boðað frá, at hann gevst sun formaður á komandi aðalfundi.

Limur, sum er áhugaður at stilla upp sum formaður, skal stilla upp áðrenn 15. desember 2017.





# Frá Maskinmeistarafelagnum

**10-04-2017 Starvsmannafelagið**
P/F Fakfelag og Ognarfelagið møttust at tosa um samanseting av nýggjari nevnd til LÍV, nú aðalfundur skal vera.

**19-04-2017 Kopargøta 1**
P/F Fakfelag og Ognarfelagið møttust í fundarhølunum hjá LÍV. Stjórin kunnaði feløgini um roknskapin hjá LÍV áðrenn aðalfundin.

**24-04-2017 Helsingfors**
Fundur millum limafeløgini í NMF.

**03-05-2017 FSN**
Fundur millum manningarfeløgini um status í málinum um „Vesturland", sum gjørdist vrak eftir eldsbruna. Semja var um at heita á advokatin hjá feløgunum at fáa málið avgreitt.

**05-05-2017 Vinnumálaráðið**
Landstýrismaðurin í uttanríkis- og vinnumálum fekk handað álitið „Sjóvinna - sjóvinnupolitikkur 2017" frá arbeiðsbólkinum, sum hevur dagført sjóvinnupolitikkin og orðað eina maritima ætlan fyri Føroyar.

**08-05-2017 Hotel Hafnia**
BREXIT, tað vit vita. Løgmaður beyð vælkomin og hevði eina stutta framløgu um tær broytingar, sum kunnu væntast. Síðan vóru fimm gestarøðarar, ið høvdu hvør sítt innlegg um evnið.

**15-05-2017 Vinnunevndin**
Á fundi saman við FSN í Vinnunevndini.

**18-05-2017 Norðurlandahúsið**
Til móttøku í sambandi við at íslendsku forsetahjúnini vitjaðu Føroyar.

**19-05-2017 MF, Nevndarfundur**
Tvey mál til kunning. 11 mál til støðutakan. Greitt varð frá fundi í Vinnunevndini og síðan um sjóvinnupolitikk. Støðutakan. Minnisvarðin í Svínoy. Uppsøgn av sáttmálum. Umboðan í fiskivinnuráðnum o.a.

**24-05-2017 MF**
Undirskrivað avtalu við Pf. Ocean Group Faroes Ltd., nú felagið hevur keypt Norðhavið.

**29-05-2017 Klubbagarður og Tingsalur**
Største partur av degnum fór við at lurta eftir tingfólki o.ø. um fiskivinnunýskipanirnar.

**01-06-2017 Hafnia**
Árligi fundurin hjá Realinum, har roknskapur varð lagdur fram og kunnað varð um gongdina.

**02-06-2017 Smæran**
Aðalfundur hjá ALS. Kunnað varð um roknskapin, tveir fyrilestrar vóru, ein dani kunnaði um komandi tólmenni, stjórin á Bakkafrost kunnaði um nýggja virkið og komandi avbjóðingar.

**07-06-2017 Vinnuháskúlin**
Fundur í Maritima Útbúgvingarráðnum. Kunnað varð um komandi maskinmeistaraaspirantar o.a.

**09-06-2017 MF**
Nevndarfundur. Kunnað varð um komandi aspirantskipan.
Bert eitt mál til støðutakan. Løgtingsmál nr 142/2017. Uppskot til løgtingslóg um fyrisiting av sjófeingi.

**16-06-2017 Als-húsið**
Trygdargrunnurin. Kunnað varð um hálvársroknskapin, íløgupolitikk, kt-skipan o.a.

**19-06-2017 Havnar Handverkarafelag**
Fundur við allar húsavørðarnar innan eldraøkið, har tosað varð um tilkallivakt o.a.

**23-06-2017 Vinnuháskúlin**
Prógvhandan á skúlanum. Fitt av fólki var til handina, hugnaligt og góður hýrur sum altíð við prógvhandan. 19 næmingar fingu handað maskinmeistaraprógv. Vilhelm Petersen, stjóri, bjóðaði vælkomin. Jóan Pauli Joensen, professari, var gestarøðari.

**28-06-2017 KAF**
Fundur millum KAF, SEV, og arbeiðsbólkin av fakfeløgum, sum hava fólk í arbeiði hjá SEV, um veitingartrygd og skunduppgávur. SEV greiddi frá hugtakinum „veitingartrygd". Tosað varð nakað um hetta, men semja var um at bíða við hesum arbeiðinum til eftir sáttmálasamráðingarnar.

**30-06-2017 MF**
Nevndarfundur. Bert eitt mál á skránni: Komandi lønarsamráðingar við FMA, KAF. Innkomin uppskot vórðu gjøgnumgingin. Avtalað varð at taka ein longri fund eftir summarfrítíðina og seta krøvini endaliga upp.

**04-07-2017 Lív**
Árligi kunningarfundurin um gongdina í farna ári um trygging og pensjón. MF og FSN eru í sama váðabólki. Lív hevur í dag uml. 22.000 tryggingar og umsitur fyri uml. 4,26 mia. kr. Árliga inngjaldið er uml. 300 mió. kr.

**07-07-2017 Vinnumálaráðið**
Fundurin var um skipskokkar við fiskiskipum. Trupulleikar eru við at fáa skipskokkar til fiskiskip við teimum kravdu krøvunum.

**15-08-2017 MF**
Fundur við advokatin hjá felagnum um ymisk mál, sum eru komin til felagið, nú summarfrí hevur verið. Eisini fundur við PRESS um greinar til komandi blað.




# Lat okkum hjálpa tær at seta saman fíggjarliga trygdarnetið, so hongur tað ikki á tær

Kundin eigur LÍV. Vinningurin verður borin aftur gjøgnum góðar tryggingar, lágan rakstrarkostnað og eitt munagott avkast á pensjónsuppsparingini.

Kopargøta 1, Tórshavn | www.liv.fo